# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*B36-ferðalagið á veg til Danmarkar*

# Skulu avmarka tapið

**- Tú skalt ongantíð siga ongantíð. Vónandi fáa vit eitt so mikið gott úrslit, at teir ikki fara at kenna seg tryggar, tá teir koma til Føroya, sigur Heðin Askham, venjari hjá B36, sum hevur góðan vónir undan dystinum á Brøndby Stadion í annaðkvøld**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Okkara uppgáva verður fyrst og fremst at avmarka tapið. So mugu vit síggja.

Fyri triðju ferð í søgu felagsins skal B36 royna seg ímóti einum donskum felagi í altjóða fótbólti. Áður hevur føroyska felagið roynt seg ímóti AB og FC Midtjylland. Uppgávan hesa ferð ljóðar kanska meira trupul enn tær undanfarnu. Sigursvanda Brøndby strembar eftir at sleppa aftur á oddan í donskum fótbólti, og fyrsta stigið verður ætlandi tikið, tá áhugaleikararnir úr føroyska høvuðsstaðnum vitja á Brøndby Stadion.

Venjarin Heðin Askham og hansara menn eru til reiðar, har árstalsfelagið ætlar at spæla fyri sínum møguleika.

## Tað verður torført

Í horninum úr Keypmannahavn leggur Heðin Askham dent á, at uppleggið hjá B36 verður verjukent. Tað verður dúvað upp á kvikleikan í framrættaða spælinum, og vónandi kunnu teir bjóða verjuni hjá Brøndby av.

- Vit mugu standa væl á vøllinum. Vit fara at fáa møguleikar í hesum dystinum, og tá ræður um at taka av. Vit hava góðar vónir, sigur Heðin Askhan, ið sipar til sigurin á EB/Streymi um vikuskiftið.

*Er tað hugsandi, at B36 fer at vinna seg víðari í kappingini?*

- Tú skalt ongantíð siga ongantíð. Vónandi fáa vit eitt so mikið gott úrslit, at teir ikki fara at kenna seg tryggar, tá teir koma til Føroya. Tá verður dysturin eisini leiktur á graslíkinum í Gundadali. Sjálvandi, tað verður ómetaliga torført, og tað krevur, at allir sum ein spæla væl, sigur venjarin, sum frøist um, at hann nú hevur Sam Malson og Súna Olsen at velja ímillum.

## Væl fyrireikaðir

Heðin Askham hevur kunnað seg væl um mótstøðuliðið á Brøndby Stadion í morgin. Í kvøld verður uppleggið til dystin, har brot úr venjingardystinum millum Brøndby og Randers millum annað verða víst. Í gjár og í dag hevur venjing verið á leikvøllinum. Leikararnir hava fingið nógva hvíld, og í morgun tóku teir sær eisini av løttum.

- Fyrireikingarnar eru, sum tær plaga til altjóða dystir. Í morgun vóru vit á stórari handilsmiðstøð, og seinnapartin fáa spælararnir handaviðger, greiðir Heðin Askham frá.

Dysturin byrjar klokkan 19.00 føroyska tíð, og vísir sjónvarpsrásin 3+ beinleiðis.

Christian Lamhauge Holst:

# Gevi Hanusi, Bergi og Súna bóltin

**Christian Lamhauge Holst heldur, at B36 skal satsa upp á kontra við Bergi Midjord og Hanusi Thorleifsson, og annars satsa upp á deyðbóltarnar hjá Súna Olsen**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Toppskjúttin hjá Lyngby, Christian Lamhauge Holst, hevur á landsliðnum spælt saman við fleiri av leikarunum hjá B36 – Bergi Midjord, Hanusi Thorleifsson, Herberti í Lon Jacobsen, Meinhardi Joensen og Súna Olsen.

Christian Lamhauge Holst hevur fleiri ferðir spælt móti mótstøðuliðnum hjá B36 í morgin, og hevur eisini nøkur góð ráð, tá vit spyrja hann um hetta.

– Tað verður sera trupult. Serliga tí Brøndby hevði tað sera trupult í fjør, men nú tykist at vera uppeftir. Men teir hava fingið fleiri nýggjar mans í hópin, og eru helst ikki so samanspældir, so tað er ikki so býtt at møta Brøndby beint nú, metir Christian Lamhauge Holst.

*Men hvussu vil hann so ráða B36 til at spæla?*

– Teir koma ikki at svimja í kjansum, og skulu tí nokk satsa upp á kontra. Tá skulu Hanus og Bergur fáa bóltin, soleiðis at teir fáa brúkt sín skjótleika. Og so skal Súni Olsen sjálvandi sleppa at skjóta allar teir bóltarnar, hann sleppur framat, sigur Christian Lamhauge Holst.



*Christian Lamhauge Holst*